# TILTØK

**Gudstænastur**
**Leygarkvøldið 27. august**
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 20.00 Ungdómsgudstænasta, Martin R. Jacobsen

**14. sunnudag e. Trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, altarg., Bergur D. Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11.00, Sonja Klein
***Kirkjubøar kirkja:*** kl. 12.00, Heri Joensen, altarg.
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Hans J. Joensen, biskupur
***Kaldbak:*** kl. 12.00 Sverri Steinhólm
***Bøur:*** kl. 11.00, altarg., Inga Poulsen Dam
***Mykines:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen
***Vestmanna:*** kl. 11.00, Marjun Bæk
***Hósvík:*** kl. 11.00, Bjarni Bæk, dómpróstur
***Sjóvar kirkja:*** kl. 11.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Norðskála:*** kl. 10.40 Skriftamál, kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
***Skála:*** kl. 19.00, Eilif Samuelsen heldur fyrilestur um Augustin
***Gøta:*** kl. 11.00, Martin R. Jacobsen
***Haldarsvík:*** kl. 11.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen
***Fuglafjørður:*** Familjugudstænasta, Uni Næs. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan
***Húsa kirkja:*** kl. 11.00, altarg., Hans Eiler Hammer. Nýggjur messuakul verður vígdur og tikin í nýtslu undir gudstænastuni
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00, Lestur
***Viðareiðis kirkja:*** kl. 11.00,
***Hvannasunds kirkja:*** kl. 12.00, altarg., Elsa Funding
***Húsavík:*** kl. 12.00 Jákup Reinert Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11.00, Barna- og familjugudstænasta, Jónsvein Bech
***Hvalba:*** kl. 12.30 Ólavur Rasmussen

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 19.00 Møti v/ Niels Juul Olsen

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Í dag, leygardagin, kl 15.00 Vígsluguðstænasta v/ Jóna Johannesen og Jógvan av Lakjuni, sangur: Tórbjørn & Annika, Sigrið o.o. Dansibólkurin Salti hevur framførslu. Ábit verður aftaná. Kirkjan verður víst fram kl 17.00 – 19.00, kl 19.30 Evangeliskt møti v/Eivind Frøen, sangur: Mans-trio`in úr Soli Deo Gloria.
Sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta v/Fridrik Schram, Sangur: Ester, Jannet o.o., kl 14.00 Sunnudagsskúli, Absalon Áargarð v/fam. luttekur, kl 18.00 Evangeliskt møti v/ Eivind Frøen, sangur: Tórbjørn & Annika, Sigrið o.o. Náttturði verður aftaná.
Mánadagin kl 17.15 til 18.00 venur barnakórið, 1. flokkur og eldri, kl. 20.00 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, David og Anna Rodda vísa myndir og greiða frá arbeiðinum í Senegal.
www.ebenezer.fo

**Havnar KFUK-skótar**
Vit byrja aftur í viku 35: Spírar 6 ár og 1. fl. og Títlingar 2.-5. flokk møta mikudag kl. 16.30-18.00 og Skótar 5.-8. flokk og Ungdomsskótar møta mánakvøldið kl. 19.00-21.00.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 11.00 Útifundur.
Sunnudag kl. 11.00 og 18.00 Møti. Sunnudagsskúli kl. 14.00, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti.
Mánadag kl. 17.00 Smáskótar og kl. 19 Stórir skótar.
www.frelsunarherurin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18.00 Møti í Missiónshúsinum v/ Martin Thomsen.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman byrjar aftur við Guttormi Zachariasen. Væl møtt aftur.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini byrjar aftur. Vit vísa myndir frá norðurlendsku leguni í Svøríki á stórskíggja. Væl møtt aftur.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum talar David Rodda, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Tilbiðjanarmøti. Sunnudagsskúlin er kl. 12.00. Barnaansing er undir báðum møtunum.
www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Wolf Schmidt, prestur, í Mariukirkjuni. (Talvan gongur fyri hjálparfelagsskápin Caritas). Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 28. august kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.00 til 18.00. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin.
Mánakvøldið 29. august kl. 19.30 verður fyrilestur við Lida van Diij og Joke Bos, limir í Focalare felagsskapinum í Mariukirkjuni. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.katolsk.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Einar Joensen, kl. 11.50 ABC, evnið: »Tær 5 tænasturnar« 2. partur v/ Ólavi Jacobsen – undir taluni er summarskúlin, kl. 22.00 Útifundur.
www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti við Per Aagaard Hansen úr Danmark og Ole Kristian Kjenes úr Noregi.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnanasing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 Sunnudagsskúli og Møti. Poul Færø úr Klaksvík talar. www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Hera Tróndheim.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75.*
Møti: Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøld kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Ungdómsvikuskiftismøtir í Missiónshúsinum í Kollafirði fríggjakvøldið kl. 19.30 við luttøku úr Miðvági.
Leygarkvøldið kl. 19.30 við luttøku úr Fuglafirði.
Sunnukvøldið kl. 18.00 við luttøku av Glyvrum. Okkurt verður til matna aftaná, og øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting kl. 11.00.

**Meinigheitshúsið í Sandavági**
Sunnukvøldið kl. .19.00 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara. Evnið: Nærmissión.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.

**Missiónshúsið í Miðvági**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Jenny Davidsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.


# Búskaparfrøðingur á gjaldstovuni



### Starv sum búskaparfrøðingur á gjaldstovuni er leyst at søkja

Talan er um eitt spennandi starv í einum arbeiðsumhvørvi við nútímans amboðum og skipanum og eitt starv, sum er mennandi bæði fakliga og persónliga.

Starvið fevnir m.a. um arbeiði við at dagføra roknskaparkunngerð og rundskriv og gera roknskaparleiðbeiningar á ymsum økjum. Arbeitt verður við at seta í verk mál og avriksstýring fyri tað almenna. Tú skalt gera leiðbeiningar á hesum øki og vera við at ráðgeva stovnum, hvussu mál og avriksstýring verður sett í verk. Ein ráðgevingarbólkur fer at samskipa verksetingina av mál- og avriksstýring. Tú verður tann, sum kemur at samskipa leiklutin hjá gjaldstovuni í hesum arbeiði.

Tú skalt hava eina hægri útbúgving innan roknskaparøkið. Um tú hevur arbeitt við Balanced scorecard e.t., so er hetta ein góð barlast.

Tú skalt vera opin, duga at samstarva og kunna geva íblástur til skilagóðar loysnir.

Starvið verður lønt sum fulltrúi sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

Umsóknir skulu verða Føroya Gjaldstovu, boks 2009, 165 Argir, í hendi innan 15. september 2005.

Tú kanst byrja í starvinum beinanvegin.

Leif Abrahamsen á telefon 352400 er fúsur at svara spurningum starvinum viðvíkjandi.

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Á gjaldstovuni arbeiða uml. 30 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er standardroknskaparskipanin Oracle Financials. Av øðrum skipanum undir Búskaparskipan landsins kunnu verða nevndar
- Felags lønarskipanin, sum verður karmur um útgjaldingar av øllum almennum lønum
- Búskettskipanin, sum er karmur um fíggjarløgararbeiðið hjá landinum
- Dátuvøru-húsið, sum nú er sett upp, og sum skal verða grundarlag undir eini størri framleiðslu av leiðslukunning.

Meira um hetta er at lesa á heimasíðuni hjá gjaldstovuni.

Í løtuni nýta okkurt um 600 brúkarar Búskaparskipan landsins.

Landið hevur tikið í nýtslu eina munadygga fíggjarstýringarskipan, og er grundarlag nú skapt fyri eini meira miðvísari stýring móti eini munadyggari fyrisiting. Talan er um at seta í verk mál- og avriksstýring fyri tað almenna.

Við mál og avriksstýring skulu stjórnarráð saman við stovnum seta yvirskipað mál fyri tær uppgávur, sum stovnur er settur at loysa.

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**


